

*Norðoyri er gomul bygd, og er nevnd í skjølum frá 1584. Í dag er bygdin í støðugum vøkstri. - Hetta er eitt paradís á jørð, sigur Hjørdis Hávarsá, sum hevur búð her alt sítt lív. Á myndini eru eisini yngstu børn hennara - Miriam sum er fýra ár og Karita sum er eitt*

## Úr 83 upp í 97 fólk

Hagtølini frá Hagstovuni vísa greitt, hvussu fólkavøksturin hevur verið á Norðoyri hesi seinastu árini.

Serliga stuttligt er at hyggja eftir vøkstrinum síðani ársbyrjan í fjør. Tá búðu 83 fólk í bygdini, men sum við árslok var hækkað til 97 - tað hægsta nakrantíð.

Hesin vøksturin kom fyrst og fremst av at fýra børn vórðu fødd í fjør, eitt fólk flutti úr útlandinum til Føroyar og at 12 fólk fluttu úr øðrum støðum í Føroyum og til Norðoyrar. Hóast trý fólk flutt til onnur støð í Føroyum í fjør, so kann tað kortini ikki vika tann veruleika, at fólkatalið er vaksið rættiliga nógv í fjør.

Fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár er eingin broyting hend í fólkatalinum, og 1. apríl búðu sostatt framvegis 97 fólk á Norðoyri.

Annars kann nevnast, at við ársbyrjan í ár vóru 15 børn undir skúlaaldur. At elsta mannfólkið tá var 72 ár. At elsta konufólkið - og harvið elsta fólkið í bygdini - var 86 ár.

seinastu 25 árini.

Í 1985 vóru fá hús herúti, og tá búðu einans 15 fólk á Norðoyri. Í 1988 var talið hækkað til 20, men síðani hevur tað gingið skjótt og støðugt framá. Í 1989 hækkaði talið brádliga til 45, 10 ár seinni var tað 72 og í fjør 83.

Hetta seinasta árið er íbúgvaratalið hækkað við ikki færri enn 14 fólkum. Og lítið bendi á at vøksturin fer at steðga í bræði.

Hví tað er so, hevur Hjørdis gjørt sær sínar hugsanir um. Ein av hesum orsøkum er, at kommunan hevur havt grundøki at bjóða teimum, sum vildu seta føtur undir egið borð her á Norðoyri.

Fólk í Klaksvík hava líkasum havt tvey støð at velja í: Annað er har norðuri á Grashjalla og hitt er herúti hjá okkum. Hon hevur hoyrt fólk siga um hitt økið, at tað er heldur vindhart, at tað liggur so ovarlaga og at tað tí er skjótt til kava haruppi.

Her á Norðoyri eru umstøðurnar so, at ein breiður og góður vegur tryggjar teimum samband við umheimin. Her verður grivið um veturin og her er eingin brekka. Og so er tað í roynd og veru nærum sama fjarstøða av Norðoyri og av Grashjalla til skúlarnar inni í Klaksvík.

- Tað kann kanska tykjast heldur langt at koyra út higar, tí at tað ikki liggja so nógv hús framvið vegnum. Men so man heldur ikki gloyma, at tað er púra slætt at koyra ella at ganga millum bygdina og býin, staðfestir Hjørdis Hávarsá.

### Missir sína sjarmu

Tað er veruliga so, sum Hjørdis vísir á: Fá hús eru millum Klaksvík og Norðoyri, har ein ístaðin koyrir framvið fleiri virkisbygningum og onkrum fjósi.

Tá komið er allan vegin út á Norðoyri kann ein skjótt staðfesta, at her hevur verið góður møguleiki at ogna sær grundøki og byggja sær egin hús.

Uttarlaga í bygdini sæst eitt stórt tal av nýbygdum húsum, her kommunan hevur staðið fyri stórari útstykking.

Fólkið fegnast sjálvandi um at bygdin veksur, men fyri Hjørdis hevur henda gongdin kortini eitt lítið MEN: Tað er ein ávísur vandi fyri at tann hugnaliga bygdin kann missa sína sjarmu orsakað av fólkavøkstrinum.

- Nei, eg veit ikki. Eg haldi, at tað var eitt sindur hyggeligari herúti, áðrenn tann breiði vegurin kom. Tað var faktiskt eitt sindur meiri bygdasligt!, sigur hon og brosar.

Lítla dótturin, Karita gongur so trúliga framvið barnavogninum. Nú tímir hon ikki meiri alt hetta roksið og tosið hjá teimum vaksnu. Hon vil eisini hava uppmerksomheit og fer rennandi frá mammuni og yvir til ta eldru systrina.

Mamman letst ikki um vón. Hetta er hon so von við, nú tær báðar spæla saman óræddar á vegnum inni í barnavinarligu bygdini. Í góðveðrinum í dag eru tað serliga blómurnar framvið vegnum sum hava fangað teirra áhuga.

Brádliga hoyrist dunið frá einum bili, sum nærkast bygdini. Mamman er skjót yvir til tær báðar genturnar, sum einki hava hoyrt til bilin.

Jú, tað hevur sín fyrimun at hava gott vegasamband við Klaksvík. Men tað kann eisini hava sín prís!

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*
*jensk@sosialurin.fo*



*Tað eru bert henda familjan sum ber eftirnavnið Hávarsá. Navnið kemur av hesi ánni ella løkinum, ið rennir beint við nýggju sethús teirra*



*Norðoyri liggur tætt uppat náttúruni og er eitt dreymastað hjá børnum at vaksa upp í. Ein slíkan góðveðursdag sum í dag ber alt til hjá Hjørdis og tveimum av børnum hennara, Miriam og Karitu*